Fra: Gunnvá á Lofti
Til: Anna Borg Dahl
Emne: Hoyringssvar
Dato: 16. november 2023 15:32:53
Vedhæftede filer: image001.png

Góða Anna

Takk fyri at vit fingu freistina longda.

Viðv. uppskoti til broyting í løgtingslóg um ræði av málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur).

Viðvíkjandi niðasta broti í pkt 1.3 og 1.7, so kunnu hesi brot misskiljast. Sjóvinnustýrið tekur undir við, at tað er umráðandi at fylgja væl við í IMO høpi, tí tað leypandi verða gjørdar dagføringar í teimum altjóða sáttmálum, ið eru settir í verk í sjólógini. Hinvegin hevur IMO skoðanin og Paris MoU umsóknin ikki beinleiðis við sjólógina at gera. Harafturat fáa Føroyar ikki beinleiðis eina góðkenning eftir skoðanina, so hetta kann virka misvísandi.

Sjóvinnustýrið mælir til, at tað í hesum brotum heldur verður lagdur dentur á júst teir altjóða sáttmálar, ið verða settir í verk í sjólógini fyri at nágreina, hvat fyri altjóða sáttmálar eru at liva upp til á júst hesum økinum. Við hesum er eisini ein meira neyv lýsing av, hvørjir altjóða sáttmálar mugu fylgjast neyvt við framyvir eftir yvirtøkuna.

Vísandi til fylgiskjalið frá Søfartsstyrelsen vil Sjóvinnustýrið eisini leggja dent á, at pengar mugu setast av á fíggjarlógini til at røkja altjóða samstarvið, so samstarvið kann halda áfram, hóast málsøkið verður yvirtikið.

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um broyting í sjólógini og øðrum lógum: (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum sjórættur oa.)

Talið á anordning er nokk av ósketni blivið til 1122 ístaðin fyri 1121. Í uppskotinum stendur: anordning nr. 1122 frá 29. juni 2022.

Í hesum tekstinum er eitt ikki ov nógv:
Til § 1, nr. 4
Í § 474, stk. 2, nr. 3, § 477, stk. 3 og § 479, stk. 2 verður ", Søfartsstyrelsen" strikað, tí mett verður ikki, at Søfartsstyrelsen aftaná yvirtøkuna ikki skal hava hesar heimildirnar, tá økið er yvirtikið. Ásetingarnar snúgva seg um sjóforhoyr.

Vinarliga / Best regards

Gunnvá S. á Lofti
Head of Department, Legal, shipregistry & manning
DIR +298 35 56 05 gunnval@fma.fo

Bókbindaragøta 8
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
TEL +298 35 56 00
www.fma.fo fma@fma.fo